Fara skjótt at hita upp til oyggjaleikirnar á Álandi

Ikki meira enn eru oyggjaleikirnir í Føroyum av á hesum sinni, so verður skjótil settur á komandi leikirnar á Álandi í 1991.

Longu í september fara álendingar at senda út innbjóðingar til allar limaoyggjarnar, har sagt verður frá, hvørjar ítróttagreinar teir kundu hugsað sær við á leikunum um tvey ár.

Tað er tí longu tíð til at hugsa um at byrja upphiting til komandi leikirnar og ikki minst hjá teimum mongu av okkara nýggju ítróttaandlitum, eitt nú innan frælsan ítrótt, bogaskjóting, súkkling o.a.

Sum nakað nýtt á leikunum á Álandi verður moguliga golf, tennis og windsurfing.

Ítróttarsosialurin hevur hitt nýggja formannin fyri oyggjaleikirnar John Kjær. Hann tók við eftir manbúgvan Owen le Vallée.

Felagskapurin fyri Oyggjaleikir, Island GamesAssociation IGA, hevði, í samband við at »Oyggjaleikir '89« vóru í Føroyum, aðalfund á Hotel Hafnia tann 8. juli.

Á aðalfundinum var millum annað val av nevnd. John Kjær úr Føroyum varð valdur formaður, meðan álendingurin Dick Ekstrom varð næstformaður. Hinir triggir nevndarlimirnir eru Allan Cross av Jersey, Bo Eryksenstrøm av Gotlandi og Vernon Shimmin av Isle of Wight. Vernon Shimmin er nývaldur, meðan hinir fyra allir [illegible] aftur valdir.

Til aðalskrivara í IGA [illegible] Corlett av [illegible], sum eisini [illegible] skriv vórðu send út og varð Ítróttarsamband Føroya eisini boðið við á fyrstu oyggjaleikirnar. ISF heitti so í 1984 á meg og Sofus Johannesen um at skipa fyri og vera leiðarar hjá føroyska ítróttarhopinum, ið tók lut í leikunum á Isle of man í 1985.

— Hetta var so byrjanin til starv mitt innan IGA, tí á fundi á Isle of Man, har allar oyggjarnar gjørdu av, at oyggjaleikir skulu verða annaðhvørt ár, varð eg valdur í fyrstu nevndina. Henda nevnd fyrireikaði so stovnanina av sjálvum felagsskapinum, smíðaði logir og reglugerðir og royndi at fáa alt ítróttini viðvikjandi í fasta legu.

— Á Guernsey í 1987 varð so sjálvur tann stovnandi aðalfundurin hildin, og varð eg tá valdur næstformaður.

Nú varð tú so valdur formaður. Er hetta eitt starv tú kemur at røkja í nógv ár?

— Nei. Formanstíð min er avmarkað. Tá næsti aðalfundur hjá felagsskapinum verður hildin á Álandi í 1991 verið eg noyddur at fara úr nevndini. Tað er soleiðis, at logirnar hjá IGA siga, at formansskifti verður á hvørjum aðalfundi. Hetta tí, at tann tjóðin, ið hevur leikirnar, eigur formanssessin aftaná loknar leikir, meðan komandi »vertstjóðin« eigur varaformannin. Tíverri hava vit ikki í lógum okkara tikið hædd fyri, at fyrrverandi formenn kunnu verða valdir aftur í nevndina og hetta er stórt spell. Ikki tí at eg sjálvur havi ætlanir um at verða sitandi í nevndini longur enn komandi tvey-ára skeiðið, men tí at vit øll somul fegin vildu havt fyrrverandi formannin, Owen le Vallée av Guernsey, at hildið fram sum nevndarlim. Hann hevur roynst felagsskapinum avbera góður formaður, er dugnaligur og vitandi og tungt verður at lyfta arvin eftir hann. Hann hevur tíbetur játtað at hjálpa serstakliga Dick Ekstrom og mær, nú størstu byrðarnar verða lagdar á okkum, og verður hann møguliga knýttur at nevndini sum »tekniskur« ráðgevi.

Viðari greiður John frá, at nevndararbeiði í IGA kann vera rættuliga trupult. Hetta av tí, at nevndarlimirnir koma úr ymsum pørtum av Europa og at møguleikar tí ikki eru fyri at hittast so ofta sum ynskiligt. IGA felagsskapurin hevur bert lítlar peningaupphæddir at ráða yvir og eru tað tí í stóran mun nevndarlimirnir sjálvir og ítróttarsambondini í londum teirra, ið figgja arbeiðið.

— Nevndararbeiði fer í stóran mun fram gjøgnum brævaskifti og telefonsamrøður, men eisini telefax- og telexsamskifti verður nógv nýtt, og um Ítróttarsamband Føroya ikki hevði víst IGA felagsskapinum so stóran ans sum tað ger, so hevði verið púra ógjørligt hjá mær at røkt starv mitt.

— Næsti regluligi nevndarfundur okkara verður ikki fyrr enn á Álandi í juni mánað komandi ár, og tá vit hava ætlanir um at fyrireika ymsar logarbroytingar, er eingin ivi um, at neyðugt verður við stórum brævaskifti komandi ári.

Nú nevnir tú sjálvur, at tit skulu til at fyrireika ymsar logarbroytingar. Fyrireikingarnevndin av »Oyggjaleikunum '89« hevur millum annað havt trupulleikar av liðum, ið hava givið avboð so seint, at hetta hevur ávirkað ymsu ítróttargreinarnar. Er hetta nakað, sum nevndin í IGA fer at arbeiða við?

— Longu aðrenn sjálvan aðalfundin høvdu vit ein nevndarfund, har vit viðgjørdu teir trupulleikarnar, sum Judosamband Føroya hevði at dragast við orsaka av teimum avboðum, ið komin vóru. Hvussu fegnir vit enn vildu, so høvdu vit ikki heimild til at víkja frá lógunum, ið siga at fyra luttakarar mugu til fyri at ein kapping skal hava virði, og átalaði nevndin harðliga atburðin hjá teimum oyggjunum, ið góvu avboð í síðstu løtu. Hesi avboð raktu jú ikki bert fyrireikararnar, men eisini í stóran mun tey ítróttarfólk, ið høvdu leitað sær til lFøroyar at kappast.

— Til komandi aðalfund vilja vit leggja fram ymisk uppskot, ið skulu forða fyri slíkum avboðum. Millum annað verður hugsað um at krevja ávist gjald fyri luttøku, sum ikki verður afturgoldið, um oyggin tekur seg úr kappingini. Eisini verður umhugsað at seta í verk ymisk revsitiltøk, ið vilja forða fyri at einstøk ítróttafólk vísa leikunum og hinum ítróttafólkinum slíka likasælu, sum tey gjørdu hesaferð.

— At føroysku fyrireikararnir so megnaðu at broyta kappingar sínar, soleiðis at øll ítróttafólk sluppu at kappast, vísir bert, at fyrireikararnir tóku uppgávu sína í alvara og gjørdu alt, ið teir kundu fyri at kappingarnar skuldu eydnast væl.

Og kappingarnar eydnaðust kanska væl?

— Ja, eingin ivi um tað. Øll tey fremmandu ítróttafólkini fóru úr Føroyum aftur við minninum um avbera góðar kappingar.

— Sersambond, deildir og felog, ið skipaðu fyri kappingunum høvdu lagt [illegible] stórt arbeiði, hetta [illegible] teir trupulleikar [illegible] at al-

Føroyingar vunnu gull í fótbólti og er hetta helst besta fótboltsurslit okkara nakrantíð (Mynd: kalmar)



→